# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Stórsligin finaludagur á Tvøroyri

**22. mars verður stórsligin FM-finaludagur á Tvøroyri, tá nakrar av FM-finalunum í yngru deildunum skulu avgreiðast**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Karmarnar vera í hásæti, og fyrireikararnar vænta nógv folk í høllini í Trongisvági, tá stórsligin FM-finaludagur verður hildin á Tvøroyri 22. mars.

### Sama gólv sum í steypafinaluni

Til serliga FM-finaludagin á Tvøroyri, hevur Flogbóltssambandið valt at koma suður við serligu máttuni, ið vanliga verður nýtt til árligu steypafinalurnar, og tað skal vera við til at gera karmarnar enn betur, og til at fáa eitt slag av hátíðardámi yvir finalurnar hjá framtíðar flogbóltsleikarunum í Føroyum.

### Stóran týdning fyri framtíðina

Tummas Óli Mortensen, ið er kappingarleiðari í Flogbóltssambandinum, er ikki í iva um týdningin av slíkum tiltaki.

- Tað er av alstórum týdningi, at vit geva ungu leikarum okkara, tær optimalu umstøðurnar, og gleðast yvir at TB hava so góðar umstøður. Vit vænta at tey har suðuri fara at skipa fyri einum rimmar degi, og vit fara at gera okkara part, til tess at hjálpa teimum á veg eisini. Og sjálvandi vóna vit at ein rúgva av fólki kemur suður , eins væl og suðuroyingar koma vestur í høllina, sigur Tummas Óli Mortensen, ið ikki vil útiloka, at hann sjálvur kemur suður at døma onkran dystin.

Tummas Óli er kendur sum eini av dómarunum í steypafinalunum, ið á hvørjum ári hava verið eitt virðuligt punktum fyri steypakappingunum, og sum hava verið sera væl vitjaðar, tá tað um áskoðarar umræður.



*Tummas Óli Mortensen, ið er kappingarleiðari hjá flogbóltssambandinum, vónar og væntar at tað verður ein væleydnaður FM-finaludagur á Tvøroyri, 22. mars. Tummas Óli, hevur saman við Jan Hentze verið við til at dømt allar steypafinalurnar í flogbólti, síðan hesar byrjaðu*

### FAKTA

**Finalistarnar í FM**

| | | |
|---|---|---|
| **Gentur 14 ár:** | TB-Fleyr | (Byrjar klokkan 10:00 leygarmorgunin) |
| **Kvinnuunglingar:** | TB-KÍF | (Byrjar skamt eftir Gentur 14 ár o.s.v.) |
| **Dreingir 14 ár:** | TBa-TBb | (Byrjar skamt eftir Kvinnuunglingar) |
| **Mansunglingar:** | ÍF-SÍ | (Byrjar skamt eftir Dreingir 14 ár) |

# Føroymeistarar í Grand Prix funnir

GREINANAVN
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin 2. mars varð 6. og síðsta Grand Prix umfar leikt í høllini í Trongisvági. Grand Prix er tað sum svarar til landskappingina í borðtennis.

Undan seinasta umfarið vóru so nær sum allar deildir avgreiddar, men í nøkrum deildum var tættari enn í øðrum. Petur Niclassen hevur hesi seinasti árini verið nærum einaráðandi innan fyri føroyskt borðtennis, men í ár hava nakrir ungir fýrar megnað at koppa Petur av trónini innan Grand Prix samanhang.

Ragnar Egilsson gjørdist fremst í tí samlaðu Grand Prix kappingini í ár, Ragnar, ið leikar í meistaradeildini, hevur havt eitt sera gott kappingarár. Eisini ungi Rói Agnarsson endaði framman fyri Petur, men spurningurin er, um hesir ungir menn eisini megna at gera kynstrið eftir í FM, sum verður um hálvan annan mánað. Næsta kapping í borðtennis, verður FM fyri ungdóm 28-29 mars í høllini í Trongisvági.

**Bólkavinnarnir í 6. GP umfarið gjørdist:**
A: Ragnar Egilsson, Tór
B: Karl Arni Egholm, Kí
C: Páll Heri Nolsøe, TBF
D: Jónas Syderbø, Tór
E: Dánjal Petur Nielsen, Tór
F: Eirikur Mørkøre, TBF
G: Hávar Albinus, TBF
H: Jón Sigurð Poulsen, Royn

**Samlaðir vinnarnir í Grand Prix í ár gjørdist:**

**Smápiltar**:
1: Hávar Albinus, TBF
2: Dávid Mortensen, TBF

**Smápinkur**:
1: Sofía Maria Ferjá, TBF
2: Durita Jensen, TBF
3: Rebekka Petersen, TBF

**Piltar**:
1: Knútur Jóanesarsson, Tór
2: Sveinur Nolsøe, Tór
3: Eyðfinnur Jensen, TBF

**Pinkur**:
1: Anna Mikkjalsdóttir, TBF
2: Lív Øster, TBF
3: Vár Holm, TBF

**Smádreingir**:
1: Heini Mortensen, TBF
2: Mathias Mortensen, TBF
3: Tóki Thorteinsson, Tór

**Smágentur**:
1: Marin Sofía Brattalíð, TBF
2: Birita Mortensen, TBF

**Dreingir**:
1: Fróði Jensen, TBF
2: Jákup Thomasen, TBF
3: Páll Heri Nolsøe, TBF

**Gentur**:
1: Rakul Mikkjalsdóttir, TBF

**Mansunglingar**:
1: Rói Agnarsson, Tór
2: Hallur Thorteinsson, Tór
3: Pætur Albinus, Tór

**Meistaradeildin menn**:
1: Ragnar Egilsson, Tór
2: Petur Niclassen, Tór
3: Fríði Jensen, TBF

**Meistaradeildin kvinnur**:
1: Marin Í Dali, TBF